## DAGSINS MEINING

# At taka í egnan barm

Formaðurin í Fiskimannafelagnum, ið er tikin úr leikum sum samfelagsrevsari, finst í blaðsamrøðu at okkara undómi, tí hann ikki tekur lut í eitt nú arbeiðinum hjá Amnesty International í Føroyum. Formaðurin fyri Reyðakrossi var í útvarpinum í gjár og bar uppundir tað sama. Báðir felagsskapir gera eitt stórt og dygdargott arbeiði hvør á sínum øki. At hjálpa samvitskufangum og at hjálpa, har krígg og neyð valda, skuldi kunnað engagerað føroyskan ungdóm. Men so er ikki, og tað tykist, sum at tað fer at ganga afturá við hesum báðum felagskapum.

Tað má vera upplagt at spyrja, hví støðan er vorðin so, sum nevndu formenn lýsa hana. Eru tað foreldur og skúli, sum svíkja? Er tað tann ráðandi ungdómsmentanin? Er tað samfelagsgongdin sum heild? Vit liva, sum tey flestu vita, í eini tíð, har individualisman og egoisman eru høgt í metum. Hetta er tann ráðandi vesturlendska mentanin í løtuni. Tað kollektiva er out. Tað individuella er in. Her finna vit ivaleyst eina av orsøkunum til tann ringa standin. Kapping fram um samstarv og netverk fram um felagsskapir og stættarmedvit. Soleiðis er heildarmynd í dag, men hon er sjálvsagt ikki galdandi fyri alt og øll og hendan myndin varir ikki í ævir. Áðrenn vit vita av, er einhvør onnur ungdómsmentan komin í hásæti og onnur rák seta ungdómsins dagsskrá.

Við hesum bakstøði skuldi tað verið greitt, at eisini felagskapirnir sjálvir hava eina stóra ábyrgd og eiga at taka í egnan barm. Hvat gera teir fyri at fáa ungdómin við? Hvat gera teir fyri at røkka teimum mongu ungu, sum kundu verið eitt ómetaligt tilfeingi hjá báðum felagsskapum? Hvussu nýta teir sínar heimasíður, ið eru ungdómsins miðil? Duga teir at tala tað mál, sum tey ungu skilja? Politikkarar duga ikki hetta kynstur og tað knípur hjá lærarum og pedagogum – fyri ikki um at tala foreldrum! Hinvegin kann einki samfelag klára seg uttan ein engageraðan ungdóm. Tískil mugu foreldur, skúli og slíkir vælgerandi og sera týdningarmiklir felagskapir sum Amensty og Reyði Krossur taka í egnan barm og fara undir eitt miðvíst arbeiði fyri at røkka teimum ungu, sum jú einaferð skulu føra hetta týdningarmikla arbeiðið víðari.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hitastig við kulda og annað møsn

**Heri Mohr**



Góði Tórður Jóansson, skyldmaðurin.

Í Dimmalætting (Skáanum) hevur tú í nøkur ár átt áhugaverda teigin "Málhornið", har tú viðgert mál og vandamál - serstakliga føroyska málinum viðvíkjandi. Hóast tað, tú skrivar, yvirhøvur er á akademiskum, "professionellum" støði, skilja vit vanligu á gólvinum, - sum Nyrop Rasmussen tók til á sinni, óivað tað nógva av tí.

Í Málhorninum nr. 125 fáa vit at vita, at Skáin fer í summarferiu. Tú brúkar orðið summarfrí, men eg haldi, at summarferia er tað betra orðið, tí at hava frí nakrar dagar av eini og hvørjari orsøk, hevur einki við feriu at gera. Frí og feria eru hvør sítt og hava lítið við hvørt annað at gera.

Eins og hetta "man vera sætta ella sjeynda árið", tú hevur havt viðgerð um mál í skrift og talu, so eru onnur, sum í sama tíðarskeiði hava skrivað stórt tal av brøvum um ágangin móti okkara mentan (kultur) og sosialu korum, t.v.s. okkara dagligu tilveru her í Føroyum. Okkara 1000 ára gamla mannatilvera er álvarsliga hótt innanífrá. Og orsøkin er, segði ein maður nú ein dagin, degenererað, nostalgisk nationalisma við hættisligum eginleikum. Hann fór smáflennandi í neystið eftir snørissúluni og skríninum, ætlaði sær eitt rend í fjørðin at lofta kyrrindunum.

- Der bode en underlig gråsprængt en…..

Nokk um tað.

Tú sigur, at tú hevur fonglast við at lesa gudfrøði. Ja, soleiðis kann tað eisini sigast. Tillukku við próvnum.

Tak tað ikki illa upp, at eg seti tær nakrar spurningar:

Hvat heldur tú um avgerðina at broyta navnið á tí almenna stovninum Landsverkfrøðingurin til Landsverk? Ber hetta navnið ikki brá av einum láturligum torso við ongari meining ella innihaldi, kundi tað ikki eins væl itið Sjóverk ella Luftverk. Tað næsta verður ætlandi, at býráðið, sum pr. traditión eltir landsstýrið, fer at broyta Býarverkfrøðingin til Býarverk? Hevði tað ikki verið nærliggjandi at broytt navnið til Føroya Verkfrøðingsstova, vit hava jú fleiri almennar stovur: Føroya Gjaldstova, Matrikulstovan, Almannastovan o.a. Hvar er hugflogið og máloyrað?

Føroya Verkfrøðingsstova við einum stjóra v.m. hevði óivað verið skilagott.

Og hvat heldur tú um hetta at broyta starvsheitið sjúkrasystir til sjúkrarøktarfrøðing? Á einum sjúkrahúsi virka sum kunnugt nógv fólk innan røktarfrøði: Læknar, sjúkrasystrar, røktarar, psykiatarar, patologar, fysioterapeutar, ergoterapeutar, portørar og onnur. Hesi eru øll hvør á sínum øki sjúkrarøktarfrøðingar. Florence Nightingale var sjúkrasystir, Edith Cavell, sum varð skotin av týskarunum í 1915, var sjúkrasystir, og mundi Móðir Teresa ikki útinna sjúkrasystraarbeiði?

Ikki tær at siga, í Onglandi skilja tey ímillum nurse og male nurse. Sjúkrarøktarfrøðingur sum starvsheiti sigur okkum einki um starvið; er hann lækni ella sjúkrasystir ella terapeutur o.s.fr.?

Sjúkrarøktarfrøðingur! - tungan ballar sum í eini spiritusroynd.

So eru tað veðurtíðindi. Tá ið eg fái at vita, at barometrið fer niður eftir í staðin fyri at fella, og gongur upp eftir í staðin fyri at reisa, og hitin er eitt kuldastig, verður barometurfall í mínari stovu. Hvat heldur tú um hetta, og ræðist eisini tú orðini varma og termometur, sum sigur okkum, hvussu temperaturin er? Tað er ikki ov nógv sagt, at termometur er í hvørjum heimi.

Tá eg var smádrongur, fóru havnarmenn í Geil fyri at vita, hvussu barometurstandurin var, og um kuldi ella varmi var í luftini. Har, skorin inn í ein vegg vard við glasi, vóru barometur og termometur.

Politikarar og fjølmiðlar eru farin at brúka orðið einskilja, tá ið talan er um at selja almennar ognir. Kennir tú orðið, og hvaðani kemur tað ?

Fyri at siga sum er: Orsøkin til at eg skrivi tær hesi fáu orð, er yvirskriftin til Málhornið nr. 125: Afturhvarv. Eg havi ongantíð hoyrt ella sæð hatta orðið. Hvussu skal tað skiljast?

Og so tað seinasta orðið í greinini: Avgust. Hví stavar tú august mánaðin við v, hevur orðið nakað við avgust (kaskelot), heimsins stórsta tannhval, at gera? Grannalondini sunnan fyri og eystan fyri okkum skriva eins og vit ársins áttanda mánað við u (august).

Tað hevði verið hugaligt at fingið svar upp á tað, sum eg spyrji teg um, kanska í Dimmalætting, nú Skáin er farin í summarferiu.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Ungdómurin - mítt álit

**Erhard Jacobsen**



Eg má siga, at tað er langt síðan, at vit í her í landinum hava hoyrt so viðkomandi samrøðu sum hana, sum Sosialurin hevði við Óla Jacobsen, formann í Føroya Fiskimannafelag, seinasta leygardag. Og ongin kann siga annað enn, at Óli hevur grein í sínum máli. Orsøkin til, at eg fekk hug at gera nakrar viðmerkingar til hesa samrøðuna er, at eg haldi, at adressan er skeiv. Tað er skeivt at ákæra ungdómin fyri líkasælu og fyri ikki at vísa solidaritet, tí ungdómurin er - tað eg haldi meg vita - helst væl meira at sær komin moralskt enn vit tilkomnu.

Óli Jacobsen gloymir kanska tað týdningarmesta í hesum sambandi: okkara samfelag er ikki eitt solidariskt samfelag! Tíbetur hava vit ein hóp av einstaklingum, sum eru solidariskir (eisini um vit síggja burtur frá upplopunum, tá ið vit eina lítla løtu eru heimsmeistarar í hjálpsemi).

Eitt samfelag, sum ikki er solidariskt, kann ikki rokna við, at ibúgvarnir gerast solidariskir. Eru teir tað, so er tað antin tí at teir eru góð fólk, ella tí at tað gevur teimum onkrar fyrimunir at vera solidariskir.

### Okkara samfelag eggjar ikki til solidaritet

Eg kundi nevnt ein hóp av dømum um, at okkara samfelag ikki eggjar til solidaritet, men skal bara nevna nøkur heilt fá.

Vit hava seinastu dagarnar hoyrt um, at vinnufólk bara kunnu lata vera við at lata inn mvg-uppgerð. Úrslitið er, at einar 40 mió. kr. eru ikki goldnar i mvg, og tað løgna er, at hetta óskilið óátalað sleppur at halda fram. Onkur annar skal so gjalda hesar 40 mió. kr. sum mangla. Hetta er tískil eitt slag av tvungnum solidariteti, sum í hesum føri tíverri vendir skeivan veg.

Eitt annað dømi er skattalógin, sum herfyri við vilja varð løgd soleiðis til rættis, at múgvandi skuldu kunna taka stórar peningaupphæddir úr virkjum til privata nýtslu, uttan at gjalda skatt. Fólk vistu um hetta skattaholið, men millum politikarar var krav um, at holið skuldi ikki tettast! Burtursæð frá, at slík lóggáva oyðileggur samfelagsliga moralin og ger, at onnur mugu rinda tað, sum manglar í almenna kassanum, so førir hon við sær økta privatnýtslu, sum hevur skaðiliga ávirkan á prísleguna í landinum. Tvs. tvífalt skaðiligt. Eg kann eisini nevna fiskimannafráttin, sum møguliga er skilagóður í eygunum á teimum, sum standa saman um júst hendan ágóðan, hvat veit eg, men solidariskur er hann ikki.

Og so kann eg í sama viðfangi nevna, at tingmaður og formaður fyri tingnevnd herfyri fyri opnari mikrofon viðgekk, at tingmenn hava ikki gjørt sítt arbeiði til lítar, ja, høvdu forsømt sínar embætisskyldur, nú tað er avdúkað, at ein stórur partur av søluni á fiskamarknaðinum eru proformasølur. Vóru tað ikki júst tingmenn, sum í ringastu krepputíð játtaðu sær sjálvum stóra lønarhækkan og eftirløn, tí at hetta skuldi gera teirra arbeiði meira professionelt?

Onnur dømi kundu verið nepotisma í tí almenna starvssetanarpolitikkinum. Ella at ung, sum hava áræði og hug at gera avrik, ofta uppliva, at tað almenna hevur ikki brúk fyri teimum ella teirra førleikum, tí at krøvini til avrik í almenna sektorinum ofta eru smá, ógreið ella slettis ongi. Úrslitið er, at hesi einaferð ágrýtnu, sum høvdu visiónir, sum frá líður gerast kynisk, og kynisma er ikki fremjandi fyri hugin at vísa solidaritet. (Eg tosi her um tað almenna, tí eg kenni ov lítið til viðurskiftini í privatari vinnu).

Afturat hesum kundi eg nevnt tann miðvísa ágang, sum ávísir bólkar í okkara samfelag uppliva: t.d. hjún, sum liva saman ógift, samkynd ella fólk, sum vóru ímóti apartheid. Uttan nakra sum helst eftirkannan vórðu og verða hesi løgd undir at vera syndarar, svínsk, nassarar, tápulingar, ella tað, sum verri er. Slíkt fremur heldur ikki solidaritetin!

### Solidaritetskenslan á fjølmiðlaøkinum

Annað dømi, sum eisini lýsir solidaritetskensluna, er á fjølmiðlaøkinum. Um vilji var til tess, so høvdu allir føringar í dag havt atgongd til eitt úrval av teimum bestu sjónvarps- og útvarpsrásunum í øllum heiminum, og uttan at skula gjalda nakra stórvegis upphædd fyri tað. Ein skipan sum SVF t.d. kundi umsitið. Men so skuldi ikki verða. Tað (almenna) privata skuldi sleppa framat, og úrslitið er hareftir. Í okkara húsi rinda vit í løtuni einar 10.000 kr. um árið fyri loftbornar fjølmiðlar, og eg rokni við, at fleiri onnur eru í somu ólukkuligu støðu. Heldur ikki her eydnaðist at gera eina solidariska loysn, og mær kunnugt var ein slík loysn enntá ongantíð upp á tal. Nú fer so SVF at senda DR1. Tú kanst ikki annað enn rista við høvdinum og siga: Apríl! Apríl!

### Vit hava tað gott

Men hví grenja. Í okkara samfelag nýtist okkum ikki at vera solidarisk, tí vit hava tað øll gott, í hvussu er materielt. Ja, vit liva sum greivar (ikki minst um vit samanbera okkum við onnur lond).

Land og kommunur kappast um at nøkta okkara tørv, ja, enntá tørvin hjá teimum, sum ikki hava nakran tørv. At duga at orða sín tørv og seta fram krøv og síðan fáa pressuna at bakka hesi krøv upp er ein tann týdningarmesti førleikin í okkara nútímans samfelag. Ja, at krevja er sjálvur dynamikkurin í okkara samfelag. Og hjá okkum, sum hava fingið væl av okkara krøvum nøktað, er tá bara eftir at spyrja: hvat meira kunnu vit so krevja? Tí vit eru so í dag, at fáa vit tað ikki frá tær, ja, so fara vit bara til onkran annan. Men um hetta er tað besta ella tað rætta, tað kunnu vit sjálvandi seta spurnartekin við.

Men at lasta ungdómin. Nei, tað sum eg kenni til tey ungu, so fáast tey við skilagóð ítriv (skúla, ítrótt, tónleik, list, kristiligt virksemi o.a.) Tey flestu eru sera seriøs, so seriøs, at tað verður lagt merki til tey í útlondum. Og í einum landi sum okkara, har undirlutakenslan alla tíðina liggur og lúrir í vatnskorpuni, er tað gott at hava stjørnur (bæði heilar og hálvar føringar), sum kunnu stíva sjálvkensluna av.

At tey ungu ikki tíma at fáast við politikk, fari eg ikki at siga tey ring fyri.

So Óli, eg eri líka harmur sum tú um ikki at vera nóg solidariskur. Men lat okkum ikki krevja tað ómøguliga. Sum samfelagið er, so verða íbúgvar tess. Sum stríðsmaður veitst tú, hvussu trupult tað er. Eg sigi fyri meg, at eg eri langt síðan givin at royna at broyta heimin og tær offisiellu Føroyar, tí mín ávirkan er lítil og ongin, men eg má kortini siga, at eg tryggur seti mítt álit á ungdómin.

# Pedagogútbúgvingin

**Hvør útbúgvingarstovnur kann tryggja sær bert at senda "egnaði" fólk út í samfelagið ?**

**Ása Hátún**

Vit hoyrdu nú her útvarpinum, at tvey fólk høvdu úttalað seg so negativt um pedagogútbúgvingina í Føroyum, eitt nú at *hon er vánalig, fólk koma út við prógvi, sum ikki áttu at verið sloppin ígjøgnum*, og ein persónur, sum hevur lisið í Danmark og er komin heim at gera sína útbúgving lidna, heldur, *at krøvini eru lægri her*, men at tað tó "*er blivið betri*", sum hon visti at siga.

Hesar útsagnir vóru nóg mikið til, at ein ágrýtin journalistur heldur seg hava eina søk og fer í hernað.

Sjálvandi er tað uppgávan hjá fjølmiðlunum at hava eitt vakið eyga við øllum málum av týdningi í okkara samfelag, og eisini skúlaverkið má tola at verða lagt undir luppin. Men tá eitt álvarsmál sum pedagogútbúgvingin, hetta grundstøðið í okkara undirvísingarskipan, verður tikið upp til almenna viðgerð, má tað vera eitt krav, at journalisturin hevur eitt kvalifiserað innlit í viðurskiftini, og at hon/hann í slíkum uppleggi til eitt møguligt kjak fer bæði í djúpd og breidd í staðin fyri á so smølum grundarlagi bert at gera ein kortlutan og aggresivan vørr, sum so er tað, ið fólk sita eftir við.

Sjálvur mentamálaráðharrin var eisini í andglettinum. Tað var ikki nógv, hann fekk orðið fyri seg; men eins og Pauli Nielsen, rektari, í fyrru samrøðu greiddi frá, váttaði Jógvan á Lakjuni, at *lærara- og pedagogútbúgvingin í hesum døgum verða endurskoðað, og at arbeiðið skal vera liðugt til heystar*.

Í áratíggir hevur tað regluliga verið frammi, at føroyskur skúlaskapur alt ov lítið byggir á heimliga grund, men meira bert er ein endurspegling av donskum viðurskiftum. Pedagogútbúgvingin er ein ungur táttur í føroyskum skúlaskapi, har námsføðiliga og listarliga væl skikkað fólk nú í eitt áramál við støðugum atliti eisini til tíðarrákið uttan um okkum hava lagt sál og orku í at menna eina skipan, hvørs fyrsta endamál er kunna veita børnum og ungum á øllum førleikastigi best møguligt andaligt og handaligt støði til at kunna liva væl í hesum landi. Skúlin er enn í sínari royndartíð, sum allur skúlaskapur eigur at vera tað. Framhaldandi hava tey, sum hava hetta uppalingarvirksemi um hendur, regluligar eftirmetingar um gongdina, og hugaligt er tað hjá teimum, at pedagogiskir próvdómarar uttanífrá hava givið hesum føroysku skúlaroyndum síni allarbestu skoðsmál.

Fjølmiðlaheimurin eigur tí at vera varin og ansa sær, at hann ikki spennir bein fyri heldur enn at stuðla. At fokusera upp á eina útsøgn sum hana, at pedagogútbúgvingin sendir fólk út á marknaðin, sum als ikki áttu at verið sloppin ígjøgnum nálareygað, má vera sera ørkymlandi fyri pedagogiskar stovnar og teirra avvarandi, tí hvør veit, um ikki júst teirra stovnur nú kann hava "trekt ein nittara". Vit kunnu her seta spurningin: Hvussu stendur til við øðrum fólki, eitt nú miðnámslærarum, prestum, løgreglufólki, journalistum etc., sum at kalla øll hava sína útbúgving úr Danmark, kunnu teirra prógv altíð veita trygd fyri dugnaskapi í verki?

Tað er nú at vóna, at fjølmiðlarnir fara at taka hetta týdningamikla evnið upp til viðgerðar aftur til heystar, tá endurskoðanin av lærara- og pedagogútbúgvingin liggur á borðinum, har skúlaverkið sum heild og umboð fyri allar brúkarar sleppa til orða.